# Óhapp á Fámjinsvegnum

**Í nógva kavanum, sum var um vikuskiftið, vóru tað ikki bert persónbilar, sum komu illa fyri. Í Suðuroynni kom ein kavaruddari nevniliga í stórar trupulleikar, tá hann brádliga gleið út av vegnum og fór bóltandi eftir bønum. Førarin náddi akkurát at leypa úr maskinuni, og søgan kundi lættliga havt endað nógv verri**



*Tað kundi lættliga endað nógv verri, tá stóri kavaruddarin hjá Landsverk brádliga fór út av fámjinsvegnum í øllum kavanum, sum var um vikuskiftið. Førarin náddi akkurát at leypa úr maskinuni, áðrenn hon fór bóltandi ígjøgnum bøin. Hann breyt nøkur riv, men tað var tíbetur tað einasta, ið hendi við honum.*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

KAVARUDDING
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Oyvindur Brimnes frá Landsverk sigur, at talan er um eina rættiliga stóra gravimaskinu, eina sonevnda gummiged, sum um vikuskiftið fór útav vegnum oman ímóti Fámjin.

Hann dugir tó ikki at siga akkurát hvat tað er, sum er hent.

– Tað hendir ofta, at kavaruddararnir fara nakað út av vegnum. T.d. at eitt hjól fer útav. Men førararnir megna sum oftast at beina maskinuna innaftur á vegin, uttan stórvegis hóvasták. Eg dugi ikki at siga júst hvat tað er, sum er hent her, men hetta er ikki nakað, sum plagar at henda ofta hjá Landsverk, sigur Oyvindur Brimnes.

Hann sigur tó, at har, stóra maskinan fór útav, er eitt ógvuliga knapt sving á vegnum, og tað kann kanska hava havt sína ávirkan á, at maskinan fór útav. Umframt tað, var jú nógvur kavi, so stóra maskinan er allarhelst er gliðin.

Sum skilst, var talan um eina rættiliga ógvusliga hending.

– Førarin var til arbeiðis og ruddaði kava, tá gravimaskinan brádliga, av eini ella aðrari orsøk, fór út av vegnum. Førarin mátti leypa út úr maskinuni, og náddi tað akkurát, áðrenn maskinan fór bóltandi runt og endaði niðri í bønum. So vítt sum eg havi hoyrt, breyt førarin nøkur rivjabein, men kom annars ikki til skaða, tíbetur, greiðir Oyvindur Brimnes frá. Tað kundi nevniliga lættliga havt endað heilt galið.

Hann leggur afturat, at har, sum maskinan fór útav, var eingin autoverja og at talan helst var um eitt hendiligt óhapp.

### Verður ikki afturgjørd

Hóast tað tíbetur var lítil og eingin mannsskaði, so fór maskinan rættiliga illa, tá hon fór bóltandi ígjøgnum bøin.

Oyvindur Brimnes sigur, at talan var um eina gamla maskinu, sum allarhelst ikki verður gjørd aftur.

– Vit hava longu keypt eina nýggja gravimaskinu, og tað var bara ein spurningur um tíð, áðrenn hin gamla skuldi setast. Hin nýggja verður í løtuni nýtt í samferðsluhavnini, men kemur nú inn fyri hina gomlu, sigur hann.

Av tí, at maskinan er landsins ogn, var hon ikki tryggjað. Tað er nevniliga ikki loyvt at tryggja landsins ognir, veit Oyvindur at siga.

Tí var tað kanska heppið í óhappinum, at tað var ein gomul maskina, ið allíkavæl skuldi setast nú, ið fór.

Spurdur, um suðuroyingar so kunnu vænta sær, at vegirnir verða ruddaðir eins skjótt næstuferð kavi kemur, svarar Oyvindur, at tað skulu teir ikki vera bangnir fyri.

– Vit hava góðar maskinur til at rudda kava við, so tað verður neyvan nakar trupulleiki, staðfestir hann at enda.

Sosialurin hevur tosað við føraran av maskinuni, men hann ynskir ikki at gera nakrar viðmerkingar til málið

# Westward Ho aftur útsett

**Tey, ið hava glett seg til at sluppin Westward Ho, ið eftir drúgvar og umfatandi umvælingar uttanlands, skuldi koma aftur á Havnina í oktober/novemberr mánaði, mugu nú brynja seg við toli. Sluppin kemur nú væntandi ikki fyrr enn til várs, hóast alt**

WESTWARD HO
*Eydna Skaale*

Á heimasíðuni www.westwardho.fo stendur nú at lesa, at sluppin allarhelst ikki kemur aftur til Føroya enn, hóast hon eftir ætlan langt síðani átti at havt verið her.

Sluppin liggur í løtuni á eini skipasmiðju í Skotlandi, og umvælingin verður ikki liðug fyrr enn í seinast í november ella einaferð í desember mánaði. Hon skuldi upprunaliga vera liðug í september ella oktober.

Stóra seinkingin kemst av, at í avtaluni við skotsku skipasmiðjuna stendur, at um skipasmiðjan fær annað umvælingararbeiði, ímeðan arbeitt verður uppá Westward Ho, so skal hitt arbeiðið takast fram um Westward Ho.

Í august og september í ár vóru millum annað tvey føroysk skip verið til umvælingar á skipasmiðjuni í Fraserburgh, og hetta hevur tí verið við til, at seinka arbeiðnum uppá sluppina.

Av tí, at tað er hægsta vetrartíð, tá sluppin nú ætlandi verður liðug, hevur nevdin í grunninum Sluppin gjørt av, at Westward Ho skal vera liggjandi í Fraserburgh veturin yvir.

So tey, ið spent bíða eftir sluppini, mugu brynja seg við toli, tí væntandi kemur hon nú ikki fyrr enn í apríl mánaði komandi ár.



*Havnarsluppin Westward Ho, sum í longri tíð hevur verið uttanlands til umvælingar, kemur nú væntandi ikki aftur til landið fyrr enn í apríl mánaði komandi ár. Hetta kemst av nógvum seinkingum í umvælingararbeiðnum, sum ikki verður liðugt fyrr enn í desember. Síðani fer sluppin at liggja í Skotlandi fyri veturin*





*Næsta ár fer niðurgongdin í búskapinum rættiliga at merkjast, og tá fara føroyingar at keypa minni av luksusvørum, arbeiðsloysi fer at vaksa, og fráflyting verður úr Føroyum, væntar búskaparfrøðingur*

# Føroyingar mugu siga farvæl til marglæti

**Næsta ár fer niðurgongdin í búskapinum rættiliga at merkjast, og tá fer privatnýtslan eisini at minka. Niðurgongdin gongur fyrst út yvir luksusvørur, men vaksandi arbeiðsloysi og fráflyting verða eisini avleiðingar, heldur búskaparfrøðingur**

BÚSKAPUR
*Eyðun Klakstein*



*– Alt svingar ikki í takt í búskapinum, og tí fara vit ikki veruliga at merkja niðurgongdina fyrr enn næsta vár. Tá fer venda at koma í, og gongdin fer at síggjast aftur í øllum tølum fyri seinnu hálvu í 2005, sigur Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur*

Aftugongdin í føroyska búskapinum fer næsta ár at fáa avleiðingar fyri privatnýtsluna hjá føroyingum, og serliga í seinnu helvt av 2005 fer tað at síggjast aftur í øllum hagtølum.

Tað sigur búskaparfrøðingurin Magni Laksáfoss.

– Tað er eingin ivi um, at privatnýtslan fer at minka næsta ár, men kreppan verður als ikki so umfatandi sum í 90'unum, sigur hann.

– Umframt niðurgongd í brúkinum hjá fólki, fara vit eisini at síggja størri arbeiðsloysi og fráflyting úr Føroyum. Mín meting er, at eini 1500 fólk fara at flyta av landinum næstu árini, sigur Magni Laksáfoss.

### Sæst ikki aftur á tølunum enn

Nýggjar uppgerðir hjá Hagstovu Føroya vísa, at meðan vinnan hevur sett ferðina niður og langt frá innflytir eins nógva útgerð sum fyri einum ári síðani, hevur afturgongdin ikki fingið tey privatu at seta fótin á bremsuna. Innflutningurin til beinleiðis nýtslu var fyrstu átta mánaðirnar í ár eins stórur og hann var somu tíð í fjør.

Hetta kemur ikki óvart á búskaparfrøðingin.

– Tað tekur tíð, áðrenn fólk minka um brúkið, hóast tey vita, at niðurgongd verður. Ikki fyrr enn tey rættiliga síggja og merkja afturgongdina kemur ein broyting, sigur Magni Laksáfoss.

– Alt svingar ikki í takt í búskapinum, og tí fara vit ikki veruliga at merkja niðurgongdina fyrr enn næsta vár. Tá fer venda at koma í, og gongdin fer at síggjast aftur í øllum tølum fyri seinnu hálvu í 2005.

### Fyrst rýkur luksus

Magni Laksáfoss er ikki í ivi um, hvussu niðurgongdin í búskapinum fer at merkja privatnýtsluna.

Fyrsta teknið er, at bilasølan minkar, og hetta teknið hevur verið eyðsýnt seinasta árið. Øll tøl frá Bileftirlitinum vísa, at skrásetingin av nýggjum persónbilum minkar støðugt.

– Tað eru fyrst luksusvørurnar, sum fólk gevast at keypa. Síðani minkar keypið av húsarhaldstólum og líknandi, og klædnasølan verður eisini ávirkað. Sølan av matvørum verður ikki ávirkað í sama mun, tí har fáa fólk ikki spart í sama mun sum við luksusvørunum, sigur Magni Laksáfoss.

### Ein triðingur av kreppuni

Magni Laksáfoss heldur, at sparingin hjá tí almenna fer at styrkja niðurgongdina í búskapinum, og tá ið alivirksemið næsta árið steðgar, fara arbeiðsloysið og fráflytingin eisini at vaksa.

– Nógv av teimum fyrstu, sum mistu arbeiðið í alivinnuni, hava klárað at funnið sær nýtt arbeiðið, men tað verður verri hjá teimum síðstu, sum missa arbeiðið. Tá verður ikki arbeiðið til allar hendur, og tá kann ein møguleiki gerast at fara av landinum fyri at finna arbeiði.

– Longu í ár verður fráflyting úr Føroyum, og hon fer at vaksa næsta ár. Fráflytingin verður als ikki tann sama sum í 90'unum, men eg vænti at fleiri hundrað fólk fara at flyta av landinum. Samanumtikið rokni eg við, at niðurgongdin í búskapinum verður ein triðing av tí, sum vit upplivdu undir kreppuni, sigur Magni Laksáfoss.

# Høgni Hoydal skelkaður av hetz

**Politikarar hava ført eina ódámliga hetz ímóti Búskaparráðnum, heldur Høgni Hoydal, sum nú spyr løgmann, hvat hann heldur um, at Hermann Oskarson hevur lagt frá sær sum formaður í Búskaparráðnum. Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum heldur, at landsstýrið við síni framferð hevur elvt til, at kritiskar røddir verða tiptar**

HETZ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Tað hevur verið bæði skelkandi og óhugnaligt at síggja og hoyra ta viðferð, ið sitandi landsstýrissamgonga hevur givið Búskaparráðnum seinastu 9 mánaðirnar.

Soleiðis sigur formaðurin í Tjóðveldisflokkinum í einum munnligum fyrispurningi, sum hann fer at seta Jóannesi Eidesgaard, løgmanni í løgtinginum í dag.

Høgni Hoydal spyr, hvat løgmaður heldur um, at formaðurin í Búskaparráðnum hevur lagt frá sær eftir persónlig álop á hann frá leiðandi politikarum. Høgni Hoydal heldur, at Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, hevur verið tann ógvusligasti, men hann spyr eisini løgmann um hansara leiklut.

– Hví hevur løgmaður ikki - heldur enn sjálvur at eggja til álop á Búskaparráðið og formann tess - vart rættin og skylduna hjá Búskaparráðnum at útinna tað starv, sum tí við lóg er álagt at fremja, nevniliga at gera sínar metingar óheftar av politiskum og vinnuligum seráhugamálum, spyr Høgni Hoydal í einum av sínum spurningum.

### Kritiskar røddir verða tiptar

Hermann Oskarson hevur verið í andglettinum fleiri ferðir seinasta árið, og eftir nýggjast frágreiðingina hjá Búskaparráðnum, sum kom í síðstu viku, boðaði Hermann Oskarson frá, at hann leggur frá sær sum formaður í Búskaparráðnum.

Høgni Hoydal heldur, at hendan avgerðin hevur tætt tilknýti til ta viðferð, sum Hermann Oskarsson hevur fingið frá fleiri politikarum og einum fakfelagsformanni.

– Við løgmanni, varaløgmanni og landsstýrismanninum í Fíggjarmálum á odda - væl stuðlað av fakfelagsformanni og samgongulimum - er ein ósaklig og persónlig hetz førd móti formanninum í Búskaparráðnum, heldur Høgni Hoydal.

– Ein avleiðing av hesi hetz er, at formaðurin í Búskaparráðnum hevur boðað frá, at hann leggur frá sær. Men avleiðingarnar eru eisini sera prinsippiellar. Eitt landsstýri hevur við síni framferð elvt til, at kritiskar røddir verða tiptar - eisini tær, sum við lóg skulu vera kritiskar - og tað kann breiða seg allastaðni í samfelagnum, sigur formaðurin í Tjóðveldisflokkinum.

Jóannes Eidesgaard skal svara fyrispurninginum í løgtinginum mikudagin.



*– Landsstýrið hevur við síni framferð elvt til, at kritiskar røddir verða tiptar - eisini tær, sum við lóg skulu vera kritiskar - og tað kann breiða seg allastaðni í samfelagnum, heldur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum*